# Vit taka støði í tykkara tørvi

## SKYN





| m² | m² | | |
|---|---|---|---|
| 210 | 260 | 3 | 1950 |



# NÚTÍMANS OG SERMERKT HÚS MITT Í HAVN

Her er talan um eini nútímans og sermerkt hús, sum standa mitt í býnum í friðarliga umhvørvinum við Havnará.

Húsini eru í trimum hæddum, umframt ein tilbygningur á 70 fermetrar. Í miðhæddini er inngongd, stova, kamar og baðirúm. Í kjallarahæddini er grovkøkur, køkur, kamar og fýrrúm. Frá køkinum er útgongd út í tún. Á loftinum er stova, baðirúm við brúsu, kontór/goymslurúm og eitt hjúnarúm við atgongd til klædnarúm.

Húsini eru frá 1950, men tey eru øll gjørd av nýggjum. Stílurin er nútímans og minimalistiskur. Háglanshvíti køkurin er frá Biga. Vindeygu og tekjan eru frá 2006.

Húsini kunnu nýtast til nógv endamál. Við tað at húsini hava ein stóran og góðan tilbygning, eru tey eisini vælegnað til hava bústað og arbeiðspláss í sama húsi.

**Tú fært meira at vita um húsini hjá Skyn tlf. 35 74 00 – www.skyn.fo**









